



# Mong eru bløðini, men BLAÐIÐ er eittans ...

Ja eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 400 krónur ársfjórðingin

Samstundis eri eg við í lutakastinum um eina ferð frá

ATLANTIC AIRWAYS

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Sosialurin




# Flytidagur í Sornhúsinum

**Mánamorgunin klokkan hálvgum átta byrjar frítíðarskúlin í Klaksvík í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag. Fríggjadagin var flytidagur**

FLYTIDAGUR
*Solby A. Eliasen*



*Fríggjadagin var rokan á firðinum í frítíðarskúlanum Sornhúsið í Klaksvík, tá børn og starvsfólk fingust við at flyta innbúgv og annað í nýggju hølini, sum skúlin framyvir skal húsast í*

**Klaksvík:**
Í øllum vindinum fríggjamorgunin sóust børn og vaksin fara til gongu oman eftir Bøgøtu við flytikassum og skógvareólum. Frítíðarskúlin Sornhúsið hevur hildið til uppi á loftinum í KÍ høllini, men nú fer hann framyvir at halda til í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag, sum liggur heilt stutt frá KÍ høllini.

Stutti teinurin millum hølini bæði gjørdi tað møguligt hjá børnunum og teim vaksnu at flyta nógv av innbúgvinum sjálvi. Hetta bleiv so ein stuttligur háttur at flyta, har børnini fingu høvi at verða við.

Men tað var fitt av vindi fríggjamorgunin, so eina løtu sá tað út til at vera trupult at fáa skógvareólirnar at makka rætt. Tær høvdu hug at fara við vindinum, so tey vaksnu noyddust at halda fast. Men tað var tó ikki nakar trupulleiki, tá samanum kom, og nógv varð flent hesa løtuna. Børnini gingu so hugagóð millum KÍ høllina og nýggju hølini við flytikassum, sum vóru fullir av klæðum, leikum og øðrum frá frítíðarskúlanum.

65 børn saman við starvsfólkunum kunnu sostatt gleða seg til at byrja í nýggju hølunum hjá frítíðarskúlanum, sum er undir dagstovninum Mylnuhúsið, mánadagin.

# Væleydna teknikapping

TÍÐINDABRÆV:
*Sp/f Breyðmolin*

Í sambandi við at bakaríið Breyðmolin í Fuglafirði hevði sín 7 ára føðingardag 10. november, varð útskrivað ein teknikapping.

Teknikappingin var háttað soleiðis, at ein skuldi vera millum 7 og 13 ár og skuldi ein tekna okkurt, sum hevði tilknýti til bakaravirksemið. 80 góðar tekningar komu inn til kappingina, sum endaði mikudagin 6. november. Tekningar úr Fuglafirði, Gøtu, Leirvík, Toftum, Runavík, Oyndafirði, Klaksvík og Tórshavn vóru við í hesari spennandi kapping um eina Nokia 3410 fartelefon. Eisini var vinningur til nr. 2 (Linda Midjord, Hoyvík) og 3 (Ragnhild Joensen, Klaksvík), sum fáa hvør sítt køkufólk á sínum føðingardegi.

Hóast nógvar sera vakrar tekningar og góð hugskot, kundi tað einans vera ein vinnari, sum fór avstað við tí vælumtøktu Nokia 3410 fartelefonini. Vinnarin av kappingin gjørdist Vár Hansen (Fuglafjørður), sum hevði teknað bæði bakara og bakaríð (sí mynd). Grundin til at júst hendan myndin var vald framum aðrar var, at tekning og hugskot var framúr gott.

Sp/f Breyðmolin við Ivan Skorheim varð sum áður nevnt stovnað fyri 7 árum síðani, og hevur ment seg ómetaliga nógv. Tann nýggjasta vøran, sum bakaríið hevur kunnað bjóðað sínum kundum, er smákøkur við góðum smakki, til diabetikarar.

Breyðmolin ynskir at takka øllum teimum, sum gjørdu sær ómak við at tekna til hesa kapping.



*Myndin hjá Vár Hansen, sum gjørdist vinnari av teknikappingini hjá Sp/f Breyðmolanum.*

Framsýning av øllum tekningum verður víst fram í handlinum hjá Sp/f Breyðmolanum á Bakkavegi 12, til fyrst í desember mánaði. Støkk inn á gólvið og hygg eftir tí góða hugflognum børn hava.



*Vinnarin av kappingini varð Vár Hansen úr Fuglafirði*

# Evropeiski YWAM-leiðarin á vitjan

VITJAN
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við vitjanina av evropeiska leiðaranum fyri Youth With A Mission, Jeff Fountain, verða tvey almenn mini-seminar um heimsáskoðan.

Youth With A Mission, Føroyar, hava í hesum døgum vitjan av evropeiska leiðaranum, Jeff Fountain, ið er komin henda vegin at undirvísa á lærusveinaskúlanum (Discipleship Training School) hjá YWAM í Føroyum.

Jeff Fountain er lærara-lærdur, søgufrøðingur og sera væl kunnaður um politisku- og kirkjuligu støðuna í Evropa. Jeff er ættaður úr Ný Sælandi, men starvast sum leiðari út frá Hollandi. Hann er kendur undirvísari á YWAM-skúlum kring heimin, og ferðast eisini sum fyrilestrarhaldari fyri politikkarum og leiðandi vinnulívsfólki.

Jeff Fountain hevur m.a. skrivað partar av "Brave New Europe", sum kann síggjast á heimasíðu www.ywameurope.org undir weekly word.

Í sambandi við vitjanina verða almenn mini-seminar við evninum: Heimsáskoðan bíbliunnar.

Evnið - heimsáskoðan bíbliunnar - er sera viðkomandi í okkara døgum, nú politikarar, vinnulívsfólk, leiðarar og føroyingar annars mangan standa yvir fyri torførum spurningum, ið verða settir. Hvat lærir bíblian um hesar spurningar?

**Seminarini verða:**

– Mikudagin 20. november 2002, kl. 13.00 á Hotel Tórshavn, Sjómansheiminum

– Fríggjakvøldið 22. november 2002, kl. 20.00 í Mentanarhúsinum, Fuglafjørður

Undirvíst verður á enskum, men tolkað til føroyskt. Á seminarunum, ið eru ókeypis, verður ein drekkamuður í steðginum. Møguleiki er eisini at stuðla tiltøkunum við eini peningagávu henda dagin.